


**MYNDIR:** PEOPLE, MARIE CLAIRE, ELLE

# Torir tú út uttan sminku?




SO **LØGIÐ** TAÐ LJÓÐAR, SO ERU TAÐ **NÓGVAR** KVINNUR, IÐ **SVARA NEI** UPPÁ HENDAN **SPURNING**. TÆR FARA **IKKI** ÚT UM **DYRNAR** UTTAN **VARRASTIFT**, PUTUR OG **MASKARA**. SEINASTU TÍÐINA HEVUR **»NO-MAKE-UP«** RÁKIÐ **VUNDIÐ** UPPÁ SEG, OG **FLEIRI** KENDAR **HOLLYWOOD-STJØRNUR** VELJA AT **VÍSA** SEG SO, SUM TÆR ERU **SKAPTAR** – UTTAN HJÁLP FRÁ **SMINKU** ELLA **TELDUNI**



**SMINKA**

Inna Törnroos
inna@sosialurin.fo

– At blíva sminka er ein partur av mínum arbeiði, og eg blívi eitt sindur troytt av tí. Tí er tað deiligt onkuntíð vera púra náttúrlig, sigur sjónleikarinnan Eva Longoria, kend frá røðini »Desperatar Húsmøður«.

Hon og fimm aðrar kendar kvinnur vóru við í eini grein í blaðnum »People«, har tær vístu seg uttan nakra sminku.

Blaðið »Elle« hevur eisini havt líknandi greinir, og seinast í røðini er blaðið »Marie Clare«, ið hevur sangkvinnuna Jessica Simpson á forsíðuni.

Jessica er ikki bara ósminkað, hon er eisini óviðgjørd í telduni. Hon segði soleiðis um myndina:

– Eg vil vísa kvinnum, at eg eri bara ein vanlig genta. Oftani tá myndir verða tiknar av mær, veit eg ikki, hvussu tær síggja út, tá tær koma í blaðið, tí so nógv verður broytt í telduni. Hesuferð er onki broytt.

Ein nýggj bretsk kanning vísur, at ein av trimum kvinnum fara ikki út uttan sminku. Tær flestu av kvinnunum føla seg ikki væl, um maðurin sær tær ósminkaðar, og ein av fýra vænta ikki, at tær høvdu fingið eitt betri starv, um tær ikki vóru sminkaðar til arbeiðis.

## KLUMMAN



*Inna Törnroos*

# Tosa føroyskt við børnini!

Tosar tú føroyskt við børnini?

Eg var ikki meira enn lend í Føroyum, tá ið eg fekk hendan spurning.

Eg plagdi at svara »nei« ella »eitt sindur«, men hesaferð kundi eg errin svara »JA«!

Eg tosi føroyskt við synirnar her í Stockholm. Árið, vit búðu í Føroyum, gjørdi, at teir skiltu og tosaðu hampuligt føroyskt, tá vit fóru avstað aftur, og tað gjørdi tað lættari hjá mær at halda á fram við føroyska málinum.

Tá vit útisetar hittast, er málið hjá børnunum ofta eitt kjakevni. Tey flestu tosa føroyskt við børnini, men summi orka ikki.

Eg skilji tey!

Tí tað er ófatuliga strævið. Vænti faktiskt ikki, at nakar, ið ikki hevur roynt tað, kann skilja, júst hvussu strævið tað er. Hugsið tykkum støðuna – eg havi tveir synir, døgverðin skal á borðið, vinmenn eru á vitjan, sum ikki skilja føroyskt, og telefonin ringjur. Mitt í hesum skal eg tosa føroyskt við synirnar, svenskt við vinirnar hjá teimum, og svenskt við tey í telefonini.

Kann gott viðganga, at í slíkum førum er tað føroyska ein vavgreytur av øllum møguligum!

Eg gleðist tó sera nógv yvir, at teir skilja so væl føroyskt og tosa eitt sindur føroyskt eisini. Føroyskt er eitt lítið mál, men fyri mínar synir er tað lykilin til teirra røtur, og hann vil eg fegin geva teimum.

Hevði ynskt at skúlaverkið í Føroyum hevði stuðlað okkum føroysku foreldrum uttanlands við bókum, filmum og øðrum, sum kann lætta okkara gerandisdag.

Nú eru tað Trøllapætur og Klintrimús, ið verða spæld dag og dagliga!

Tá synirnir gerast eldri, vil eg fegin gera sum ein vinkona her hevur gjørt. Hon hevur havt síni børn í føroyskum skúla 1-2 mánaðir um árið. Tað hevði styrkt málið enn meira og lært teir at lisið og skriva føroyskt! Vónandi tekur føroyski skúlin ímóti okkum tá.

Ein lega fyri børn, ið búgva uttanlands við føroyskum foreldrum, hevði eisini verið super!

Hóast tað er striltið viðhvørt, so er tað tað vert, tá ein hoyrir tann 4 ára gamla spyrja beiggjan »Kvat gjert tú?« á reinum føroyskum!



## INNIHALD

2 KLUMMA: TOSAR TÚ FØROYSKT VIÐ BØRNINI
4 INTERVIEW: JÁKUP SUMBERG
8 TIPS: BALETTMÓTIN
10 INTERVIEW: AKSEL V. JOHANNESEN
14 90 SEKUND: BEINTA LØWE JACOBSEN
15 Í RANGASTRÚPAN: YMISKT ÚR MIÐLUNUM
15 UMAFTURAFTURUM: HØGNI DJURHUUS
18 TIL ARBEIÐIS: ANNIKA SØLVARÁ
20 HEILSUSÍÐAN: FRUKT OG GRØNMETI TIL BØRN
24 BAKGRUND: JØRÐIN SKALV UNDIR JAPAN
26 KAPPINGAR: VINN GÓÐAR VINNINGAR
28 MIÐLAMJARR: TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM
31 TAÐ HENDIR: KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ
32 VIKUMYNDIN: JAPAN

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Jákup Sumberg / Jens Kristian Vang